# Hava selt fleiri tro

**TØKNI** - Tað, sum er rættiliga áhugavert við trolkameranum og marknaðinum í USA, er, at kameraið bæði kann brúkast til at justera veiðireiðskap, soleiðis at hann roynist optimalur, og mest møguligur fiskur kemur í trolið. Í aðrar mátar kann tólið eisini brúkast í arbeiðnum at menna skipanir við ymiskum skiljiristum, soleiðis at óynsktur fiskur fer útaftur, siga Rúni Petersen og Sofus Gregersen hjá JT electric á Kambsdali

Vilmund Jacobsen



*Rúni Petersen saman við tveimum av fremstu monnunum aftanfyri Harris Electric, ið umboða og veita tænastu í USA fyri fyritøkuna á Kambsdali*

Í november luttóku umboð fyri fyritøkuna JT electric á Kambsdali á Pacific Marine Expo í Seattle. Hetta er ein framsýning við ymiskari fiskivinnutøkni, har framleiðarar og útbjóðarar sýna fram sínar vørur, og keyparar leita fram við at síggja tað nýggjasta innan tøkni.

Umboðini, sum JT electric hevði á hesi stevnu, vóru Rúni Petersen, sum er verkætlanar- og søluleiðari av trolkameranum, sum fyritøkan framleiðir og Sofus Gregersen, marknaðarleiðari.

Rúni hevur ábyrgdina av, at menningin av trolkameranum, sum má sigast at vera stoltleikin hjá JT electric, ikki stagnerar, men heldur fram.

Fyritøkan á Kambsdali hevur ikki luttikið á Pacific Marine Expo áður, men eitt nú trolvirkið Vónin hevur áður verið við á framsýningini.

Ávegis til Seattle var JT electric í Íslandi og á vegnum heimaftur var fyritøkan eisini umboðað í St. John's, har Vónin hevði eitt átak og vísti fram sínar framleiðslur.

## Søla í USA

Við allari nýgerð og menning av tøkni er neyðugt at hava neyvt samstarv við vinnuna, og tað hevur JT Electric eisini havt, síðan felagið fyri 4-5 árum síðan fór undir áhugaverdu verkætlanina við trolkameranum.

- Høvuðsorsøkin til, at vit fóru við til hesa stevnu í Seattle er, at vit hava ein av okkara bestu kundum har yviri, nevniliga American Seafood Compagny. Hetta felag hevur fleiri stórar verksmiðjutrolarar. Nøkur skip hjá hesum felag brúka okkara trolkamera, og teir eru avbera væl nøgdir. Í løtuni hava fýra skip hjá American Seafood Compagny okkara trolkamera. Hesi skip fiska eitt nú pollok uppi við Alaska.

Tað siga teir báðir, Rúni Petersen og Sofus Gregersen.

- Samstarvið millum okkum og fiskivinnufelagið í Seattle byrjaði, tá teir um norskt felag, sum seldi teimum trol, frættu um kameraið fyri umleið trimum árum síðan. Á fiskivinnustevnuni hesaferð bíløgdu teir eitt trolkamera aftrat, soleiðis at tey nú verða fimm í tali.

Í Seattle vóru nógvir áhugaðir keyparar, og JT Electric fekk eisini aðrar ítøkiligar sáttmálar um sølu av síni tøkni.

» **... umframt góða samstarvið, vit hava við Vónina, hava vit eisini etablerað okkum við onnur feløg úti í heimi, sum eru veitarar til fiskiskipaflotan...**

## Inn og út

Tað, sum er rættiliga áhugavert við kameranum og marknaðinum í USA, er, at kameraið bæði kann brúkast til at justera veiðireiðskap, soleiðis at hann roynist optimalur, og mest møguligur fiskur kemur í trolið. Í aðrar mátar kann tólið eisini brúkast í arbeiðnum at menna skipanir við ymiskum skiljiristum, soleiðis at óynsktur fiskur fer útaftur. Tólið kann soleiðis brúkast í royndini at veiða tann størra fiskin úr einum fiskastovni. Umframt at kunna brúkast í royndini at veiða optimalt, kann tólið sostatt eisini brúkast í strembanini eftir burðardyggari fiskiveiði, sum er so nógv frammi nú á døgum.

- Skipini hjá American Seafood Compagny hava stórar trupulleikar við hjáveiði av einum slagi av laksi, har kvotan er lítil og verður uppfatur minni í 2011. Trupulleikin er, at tá hjáveiðikvotan hjá skipunum er uppi, noyðast tey at gevast at fiska. Hjáveiðikvotan av eitt nú laksi er felags kvota, og tí noyðast feløgini, sum hava skip á hesi veiði, at samstarva, soleiðis at tey sleppa at fiska høvuðsfiskasløgini sum longst.

Rúni Petersen og Sofus Gregersen siga, at eitt nú American Seafood Compagny hevur arbeitt dúgliga við at finna skiljirist, sum kann slúsa laksin úr trolinum, soleiðis at minst møguligt endar afturi í posanum.

- Tað er ikki minst her, at trolkameraið kemur teimum til stóra nyttu. Tá trolið kemur at borði, og kipsið er tikið úr kameranum, sæst á livandi myndum, hvussu reiðskapurin arbeiðir. Her sæst eisini, hvussu skiljiristin virkar, og soleiðis kann arbeiðast víðari við, hvat møguliga kundi verið øðrvísi og betri.

Myndirnar, sum kameraið tekur, kunnu soleiðis eisini brúkast mótvegis myndugleikum og umhvørvisverndarfelagskapum sum prógv um, at arbeitt verður við at loysa trupulleikarnar, og hvussu virkin skiljiristin er.

- Við myndunum kunnu feløgini, sum reka hesi skip, prógva, hvussu effektiv eksklorderingin av hjáveiði í veruleikanum er, leggja teir aftrat.

## Stóran týdning

Fyri American Seafood Compagny hevur tað stóran týdning, at skipini kunnu fiska sum longst, har høvuðsfiskasløgini eru at fáa.

- Alternativið er, at skipini noyðast at flyta undan laksi til leiðir, har minni er at fáa av teimum fiskasløgum, ið roynt verður eftir, og tað gongur so aftur út yvir úrtøkuna. Stóra felagið, sum hevur keypt okkara trolkamera, gongur soleiðis á odda í royndini at minka um hjáveiðina.

Teir ásanna báðir, at upprunaliga hugskotið við trolkameranum var at geva fiskimonnum høvi til betri at síggja, hvussu reiðskapurin arbeiðir og soleiðis at kunna gera neyvari betringar og justeringar, sum kunnu gera mun fyri effektivitetin.

- At trolkameraið nú eisini er vorðið ein týðandi táttur í